## Fylg við, meðan tøðini verða gjørd

- Lukta sankutøðini *súrliga* er súrevnistrot, helst av tí at tøðini eru ov vát. Stoyt meira stroyggj í og rør.
- *Ammoniakkluktur* - ov nógv lívrunnið tilfar, stoyt meira stroyggj í og rør.
- *Maðkur í sankutøðunum* - blanda gras og/ ella illgras uppí saman við stroyggi og rør væl.
- *Lágur hiti og eingin luktur frá sankutøðunum* – Tøðunum manglar vætu ella lívrunnið tilfar. Hitin fer upp, tá ið tú stoytir meira lívrunnið í. Eru tøðini ógvuliga turr, nýt tá minni stroyggj ella stoyt eitt sindur av vatni í.
- *"Karsu-royndin" – eru sankutøðini klár at nýta?* Blanda eins stórar partar av urtagarðsmold og sankutøðum í ein borðisk og planta karsufræ í moldina. Stoyt eitt lítið sindur av vatni í og legg plastfoliu omanyvir. Er karsan spírað eftir 5 døgum í stovuhita og fullvaksin eftir 10 døgum, eru sankutøðini búgvin at nýta. Um karsan ikki spírar ella gulnar, eftir at hon hevur spírað, eru sankutøðini ikki liðug.

## Hvussu nógv sankutøð skal eg nýta?

- *Plantu– og sáðmold*. Ein part av sankutøðum til 3-4 partar av mold
- *Trø og runnar*. 1- 4 kg/m$^2$ um árið, tó mest til berjarunnar.
- *Grasvallir*. 1-2 kg/m$^2$ um árið. (Blanda fýra partar av sandi við ein part av sankutøðum og javna við rívu.)
- *Grønmeti*. Ymiskt er, hvussu nógv føðsluevni, ymist grønmeti krevur. Vanligt er tó við 1-8 kg av sankutøðum fyri hvønn m$^2$ um árið.

Les meira um sankutøð á www.torshavn.fo ella á www.irf.fo ella í hesum bókum:

- *Ren Jord - Håndbok i hjemmekompostering* frá Miljøheimevernet í Noregi, sí www.gronnhverdag.no .
- Poulina Pears: *Alt om kompost. Genbrug af husholdnings- og haveaffald.* Forlagið Akacia, 2000.


**Tórshavnar kommuna**

Telefon: (+298) 30 20 10
Faks: (+298) 30 20 11
T-postur: torshavn@torshavn.fo
www.torshavn.fo

**Agenda 21 Stovan**

Telefon: (+298) 59 07 66
Faks: (+298) 44 82 08
T-postur: agenda@fkf.fo
www.fkf.fo


# Sankutøð

## - soleiðis kemur tú í gongd!



# Sankutøð

- lívrunnið burturkast frá húsarhaldinum verður endurnýtt

Hvønn dag blaka føroysku húsarhaldini rúgvur av burturkasti burtur. Eini 25 % av hesum burtur-kasti er lívrunnið.

Tað lívrunna burturkastið eru matleivdir og t.d. tað, ið verður skor-ið og lúkað í urtagørðum.

Í staðin fyri at brenna lívrunna tilfarið á brennistøðini, kann tað í flestu førum verða endurnýtt og gjørt til sankutøð.

Gert tú sankutøð og taðar við teimum í urtagarðinum, ert tú við til at minka nøgdina av burturkasti í samfelagnum.

Og samstundis sparir tú pening, tí at nýtir tú sankutøð at taða við, sleppur tú undan at keypa dýr handilstøð.

## Sankutøð: Hvat og hvussu?

Ætlar tú tær at gera sankutøð, tørvar tær eitt ílat. Sum okkara veðurlag er, er best at brúka bjálvað ílat. Sankutøð hitna, og hitin er umráð-andi partur í tilgongdini. Besta úrslitið fæst, um hitin í sankutøðunum liggur javnt um 50-70 stig.

Ílatið skal hava fast undir-lag og verða sett á okar ella líknandi, so luft sleppur til tøðini, og væta sleppur at seyra frá.




Hevur tú eitt væl bjálvað ílat, kann alt lívrunnið burturkast frá húsarhaldinum verða sankutøð. Allar vanligar matleivdir - breyð, frukt, grønmeti, kjøt og fiskur, køkspappír, eggjaskal, te-posar, kaffiposar og kaffigrugg - verða gjørdar um til fínastu mold.

Eisini kanst tú blanda blómur og aðrar urtagarðsplantur uppí sankutøðini. Hesin parturin av lívrunna tilfarinum hevur vanliga serliga nógv føðsluevni í sær.

Fyri at gera sankutøð krevst eisini turt stroyggj, sum bara hevur smávegis føðsluevni, at blanda uppí tøðini - hølvispønir, hoyggj, børkur, leyv, ymist følnað ella turkað úr urtagarðinum, nálir og annað - er gott til endamálið.

Royndir at gera sankutøð í Føroyum vísa, at ofta er ringt at finna nóg mikið av stroyggi. Eitt gott hugskot er tí at keypa ein posa við stroyggi, áðrenn farið verður undir at gera sankutøð.

Skilagott er at hava eina ruskspann við loki í køkinum at savna lívrunna burturkastið í. Minst til ikki at blanda ólívrunnið ella umhvørvisskaðiligt burturkast uppí, tí tað kann spilla sankutøðini.

## Hvussu komi eg í gongd?

Byrja við at leggja umleið 15 cm. av kvistum, greinum ella líknandi í botnin á ílatinum. Legg síðani gras ella annað úr urtagarðinum, sum er eitt sindur niðurbrotið, omaná og blanda við einum sindri av stroyggi. Síðani kanst tú stoyta matleivdir og stroyggj í.

Nýt minst ein part av stroyggi til 3-4 partar av vanligum køksleivdum. Gert tú sankutøð úr kjøti ella fiski, skalt tú nýta minst líka nógv stroyggj sum matleivdir.

Blanda matleivdirnar og stroyggið væl saman og rør í tøðunum av og á.

Um tørvur er á tí, kanst tú stroya eitt tunt lag av stroyggi ovast, so luktar ikki.

Til ber at gera liðug sankutøð eftir trimum til fýra mánaðum í bjálvaðum ílati. Umráðandi er alla tíðina at fylgja við tilgongdini, so hon fer fram, sum hon eigur (sí punktini á næstu síðu).

Tá ið ílatið er fult, verður tað tømt, og tað ovasta lagið - tað sum er minst upployst - verður nýtt til næstu tilgerðina.

Eru tøðini góð, t.e. burturkastið er væl niðurbrotið, kanst tú nýta sankutøðini at taða við beinleiðis úr ílatinum.

Er burturkastið ikki rættiliga niðurbrotið, skulu sankutøðini eftirbúnast eina tíð (upp til 1 ár), áðrenn tey kunnu verða nýtt. Tá verða tøðini løgd í urtagarðin við plastikki omanyvir. Verður tilfarið umsett sum ætlað, luktar tað sum rálig mold.

Liðug sankutøð eru myrk á liti (svørt, tá ið tey eru vát, og brún, tá ið tey eru turr). Klára tøðini "karsu-royndina" (sí næstu síðu) eru sankutøðini liðug og klár at taða við.

Ymist er, hvussu nógva taðing ymsar plantur skulu hava. Á baksíðuni er ein stutt vegleiðing um, hvussu taðast skal við sankutøðum.



**Íløt til sankutøð í Vestmanna skúla. Íløtini eru bjálvaði við flamingoplátum og framsíðan er til at taka frá. Hetta lættir um, tá íløtini skullu tømast.**